# Listaframsýning

Í dag lata Jákup Fuglø og Ann Fuglø upp forvitnisliga málningaframsýning í List-gallarínum Fríðriksvág í Vágsbotni í Havn.

Jacob Fuglø, sum er ættaður úr Klaksvík, fór at mála um 1968 meðan hann var í Grønlandi. Síðani kom hann heim og býr nú í Hvalvík, men hevur aldrin slept penslinum og hansara myndir hanga víða hvar.

Serliga hevur hann sýnt fram í Grønlandi, men hevur eisini verið við á mongum framsýningum í Føroyum, og nú hava tey, ið eru í Havn frá 11. til 18. august, møguleika fyri at síggja myndir hansara.

Dóttir hansara Ann, sum býr í Klaksvík, er eisini við á hesi framsýning.

Opið er gerandisdagar frá 16 til 17.30 og leygardag frá 10.30 til 12.

# Ovastevna um vikuskiftið



Eins og undanfarin ár verður Ovastevna hildin í Nólsoy. Stevnan verður hesaferð vikuskiftið 11.-13. august.

Seinastu tvey árini hevur verið skipað fyri stuðulssveimjing um Nólsoyarfjørð, og so verður eisini í ár. Tað er aftur Erlendur Simonsen, sum skipar fyri »praktiska« partinum av svimjingini.

Hini bæði árini hevur verið heitt á fyritøkur um at stuðla hesi svimjing, men í ár verður gjørt øðrvísi. Í ár verður møguleiki hjá vanligum fólki at stuðla. Hetta verður gjørt við at vedda um tíðina, skjótasti svimjarin brúkar um fjørðin.

Veddað verður á serligum girokortum, ið eru løgd út á útvald posthús í landinum. Hesi eru í Vági, á Tvøroyri, í Hvalba, Havn, Nólsoy, Saltangará og Klaksvík.

Umframt at stuðla verður samstundis kappast um ein vinning, sum er ein ferð til Hetlands við Norrønu mánadag, yvirnátting á hotelli í Lerwick við morgunmati og heimaftur týsnátt. Við í vinninginum er eisini stóra kalda borðið umborð. Tann, ið er nærmastur vinnaratíðini hjá svimjarunum, vinnur ferðina. 10 tey næstu fáa eina Ovamynt.

### Kappróður og onnur tiltøk

Onkuntíð hevur eisini verið skipað fyri kappróðri á Ovastevnu og verður hetta tiltak tikið uppaftur í ár. Róðurin verður tó skipaður øðrvísi enn fyrr. Teinurin verður nevniliga einar 5000 metrar - frá Argjalandinum og á Nólsoyarvík.

Flestu 10-mannaførini fara at luttaka, nýggi og gamli Nólsoyingur, Havnarbáturin, Eysturoyingur og Vestmenningur. Spennandi verður at síggja, hvussu manningarnar fara at hildnast á so longum teini.

Sum vant verða onnur tiltøk á stevnuni. Nevnast kunnu kabarettin, sum er eitt sera væl umtókt tiltak, tivoli, kapping og spøl fyri børn, Nólsoyar sterkasti maður og so sjálvandi dansur. Fríggjakvøldið spæla lokalu Feedback, meðan kenda All that Rain spæla leygarkvøldið.

Ongum nýtist at ganga svangur á stevnuni, tí bæði breyð og pylsur verða at fáa.

Viðmerking:

# Føroyska samfelagið má nú koma víðari

Løgmansrøðan 2000 prógvaði enn einaferð, at føroyska samfelagið hevur ligið í andaleypi líka síðani sitandi landsstýri tók við.

Fullveldisætlanin hevur havt fyrsta prioritet hjá samgonguni, og fyri hesi ætlan má alt annað víkja. Næstan øll úrslitini, sum løgmaður í ólavsøkurøðuni gav sitandi samgongu heiðurin fyri, vóru í ljósmála, og um at vera loyst, longu tá landsstýrið varð skipað. Bert tvey av málunum, sum vóru nevnd í ólavsøkurøðuni vóru ikki byrjaði av álvara, tá verandi landsstýri tók við. Hetta kann ikki kallast eitt nøktandi úrslit hjá eini samgongu, sum hevur virkað í meira enn tvey ár.

### Íløguætlanin

Landsstýrið arbeiðir í løtuni við eini íløguætlan, sum er soleiðis samansett, at íløgur serliga verða gjørdar í teimum pørtunum av landinum, har lítið virksemi er. Hetta er skilaleyst, tí landsstýrið kann ikki bara síggja burtur frá tí veruleika, at meira enn ein triðingur av Føroya fólki vil helst búgva í Suðurstreymoy. Hví gera íløgur allar aðrar staðir, enn júst har, sum fólk vilja búgva?

### Búskapurin

Búskaparliga gongur væl í Føroyum í løtuni. Hetta kunnu vit øll fegnast um, og eg má geva løgmanni rætt tá hann í ólavsøkurøðuni sigur, at tað er tann góði fiskiskapurin og høgu prísirnir, sum hava vent dapurskygni til framfýsni, nógv skjótari enn nakar hevðir roknað við.

Men at løgmaður leggur saman yvirskot fyri land og kommunur fyri 1999, og síðani samanber hetta við blokkstuðulin (sum um hann bert var ein viðfáningur) tænir honum ikki til rós. Tí hvat hendir tann dagin, tá fiskaprísirnir aftur falla, um Føroyar tá eru fullveldi við ongum blokkstuðuli ?

### Fullveldið

Samráðingarnar við donsku stjórnina um fullveldið hava gingið illa, sigur løgmaður í ólavsøkurøðuni. Serliga hevur tað verið spurningurin um búskaparligu skiftistíðina, sum hevur verið eitt knútapunkt undir samráðingunum.

Nú sigur nýggjasta hugskotið, at Føroyar skulu skipa sín egna skiftisgrunn. Vit skulu goyma pengar, sum skulu nýtast í skiftistíðini. Men hvaðani skulu pengarnir koma frá?

Í hesum sambandi er vert at minna á, at landsstýrið hevur undir samráðingunum við donsku stjórnina eina ferð boðið seg til at seta eina møguliga oljuvinnu í pant fyri longri skiftistíð. Yvir 80 prosent av føroya fólki søgdu seg vera ímóti hesi ætlan.

Eg gangi út frá, at føroya fólk hava somu støðu, tá kontoin eitur skiftisgrunnur, sum tá hon eitur pant.

### Vit skulu víðari

Spurningurin er, hvussu leingi føroyska samfelagið kann liggja í andaleypi, meðan bíða verður eftir, at samráðingarnar við donsku stjórnina skulu verða lidnar. Tíðin má nú vera komin, hvar ið samgongan sleppir fullveldisætlanini, so at føroyska samfelagið kann koma víðari.

Sambandsflokkurin almannakunngjørdi fyri einum ári síðani eitt nýskipanaruppskot, sum er eitt greitt alternativ til fullveldisuppskotið. Hetta uppskot fer at geva føroyingum ótaldar møguleikar, uttan at skapa tann ótryggleika, sum fullveldisuppskotið gevur.

Tíðin er nú komin, hvar ið hetta uppskot eigur at koma til sín rætt. Vit kunnu ikki longur lata eitt heilt samfelag liggja niðurbundið, bara tí at nakrir politikarar hava veruleikafjarðar dreymar.



*Heðin Mortensen*

**Heðin Mortensen**

# Sýsluskrivstovan í Vestmanna niðurleggjast?

Norðurstreymoy fer at verða fyri stórum missi, um fútin velur at flyta sýsluskrivstovuna fyri Streymoynna úr Vestmanna til Havnar.

Alt skal flytast til Havnar, soleiðis er niðurlagi, og tað man ikki vera nøkur bygd, sum kann gera seg til undantakið longur. Miðsavning hevur verið loysiorðið hjá flestu leiðslum, og Vestmenningar hava merkt hettar so dyggiliga, millum annað tá ið SEV flutti meirilutan av skrivstovuarbeiðinum úr Vestmanna til Havnar. Eftir er bert ein symbolsk skrivstova frá tí farnu tíð, tá ið SEV bleiv stovnað.

### Tænastustøði lækkar

Nú ætlar fútin at endurtaka søguna við at flyta sýsluskrivstovuna til Havnar. Hetta fer at hava við sær, at bygdin og Norðurstreymoy sum heild fer at missa eina søguliga, góða og nærliggjandi tænastu.

Fútin hevur í útvarpssending sagt, at tað er vegna sparingar, at hann nú vil niðurleggja sýsluskrivstovuna í Norðurstreymoy. Men einki verður tó sagt um, hvat er bíligari við at gera arbeiðið í Havn.

Søguliga hevur verandi skrivstova virkað líka síðani 1898, til fútin í 1989 gjørdi ætlanir um at byggja nýggja sýsluskrivstovu niðri við Holmsbakka. Henda byggiætlan bleiv seinni slept, og man valdi at fáa núverandi sýsluskrivstovu endurnýggjaða. Alt gott um tað, men hvat kann nærumhvørvið hjá sýsluni ikki standa fyri missi, um skrivstovan verður flutt til Havnar?

Sýsluskrivstovan hevur fleiri ábyrdafullar tænastur liggjandi á sær, so sum bátaskráseting, friðingarmál, grindamál og nógv onnur politimál. Eisini røkir sýsluskrivstovan nakrar uppgávur fyri dómsvaldið og ríkisumboðið. Herundir kunnu nevnast fútasakir, deyðsbúgv, giftarmál og hjúnaskilnaðir. Tað fer heilt víst at forverra tænastustøðið, um fútin velur at miðsavna alt í Havn, á Fútaskrivstovuni, har opið er frá kl. 10 til 15. Haðani verður tú so sendur víðari til onkran annan o.s.fr.

Harafturat hevur sýslumaðurin í Vestmanna, eins og tann á Sandi og í Suðuroynni, eina døgntænastu. Hetta merkir, at øll tænasta, t.d. mynstringar við skipum, kann gerast, nær á døgninum tað skal vera - ein tænasta, ið sýslumaðurin ger av sínum eintingum.

### Færri starvsfólk

Talið av starvsfólkum á sýsluskrivstovuni í Vestmanna er tey seinastu árini lækkað, av tí at nýggj fólk hava ikki verið sett í starv, so hvørt sum fólk eru farin úr starvi. Spurningurin er so, um endamálið við hesum er at »niðurpína« stovnin fyri at rættvísgera eina niðurlegging. So hvørt sum starvsfólkini gerast færri í tali, megnar stovnurin ikki at røkja allar uppgávurnar. Hetta kann so seinni nýtast sum grundgeving fyri at niðurleggja stovnin.

Einki er at ivast í, at brúk er fyri eini sýsluskrivstovu í Norðurstreymoy. Eisini má havast í huga tann søguligi rætturin til at hava henda stovn í bygdini. Tá ið so eingin haldfør grundgeving er fyri at flyta stovnin, má sigast, at ætlanin bert tænir miðsavningini.

Heldur átti man at víst stovninum álit, og flutt honum fleiri arbeiðsuppgávur, – og eitt rímiligt tal av starvsfólkum.

*9. august 2000*

**Olav Enomoto**
Vestmanna



BLÓÐ BANKIN
Tlf. 311397



# Gamli einahandilin nú sum fløgubúð

*- Hugskotið hjá okkum var at gera ein handilin, sum kann lokka fólk inn, uttan at tað hongur eitt tilboðsskelti í vindeyganum, sigur Bjarni Ziska Dahl, annar av monnunum aftanfyri forkunnugan handil í Klaksvík*



*Edvard Fuglø frammanfyri gomlu diskarnar, har modernaður popptónleikur nú heldur til.*

**Mynd: JH**

EYÐUN KLAKSTEIN

Øldirnar møtast í fløgu- og bókabúðini, Leikalund, í Klaksvík.

Á teimum meira enn 100 ára gomlu hillunum standa fløgur framleiddar í nútímans digitalari tøkni. Og á teimum slitnu diskunum finnur tú bøkur prentaðar í litum í framkomnum maskinum.

Tað er eitt spæl millum eina farna tíð, við einahandli og avmarkaðum vøruútboð, og eina tíð, tá hillirnar eru á tremur við modernaðum popptónleiki og ein telda hevur funnið sítt pláss úti við vindeygað.

### Inn at hyggja

Edvard Fuglø og Bjarni Ziska Dahl hava seinastu tríggjar mánaðirnar rikið handilin Leiklund í hølunum hjá gamla einahandlinum, sum helt til í Klaksvík frá umleið 1840.

Og hóast framstigið hevur verið stórt síðani tá, er sjálvt grundarlagið undir nýggja handlinum - høli og innbúgv - gamalt og slitið. Men tað er samstundis tað, sum ger handilin til nakað heilt serligt.

- Tað eru ofta fólk koma inn og siga, at tey bara ætla at hyggja eitt sindur, tí tey halda at handilin er so serligur, sigur Bjarni Ziska Dahl.

- Og tað er stuttligt at síggja, at tey koma aftur, tí her er nógv at fáa við, sigur hann.

### Eisini list og hondverk

Hann og Edvard Fuglø fingu hugskotið um handilin beint eftir nýggjár.

- Vit hildu, at tað manglaði ein veruligur fløguhandil í Klaksvík, men tað endaði við, at handilin eisini kom at umfata bøkur, handverk og list, sigur Bjarni.

- Størsta sølan er í fløgum, men vit selja eisini fitt av bókum og hinum vørunum, sum vit hava.

Handilin virkar sum eitt lítið gallarí, tí á veggjunum hongur list hjá ymiskum føroyskum listafólki, og ein partur av hølunum er settur av til føroyskt hondverk og brúkslist.

### Lokka fólk uttan tilboð

At Leikalund heldur til í gomlu handilshúsunum, har Jens Klæmint Isaksen hevði handil fram til 1991, kemst av at Norðoya Fornminnafelag vil hava, at lív er í gomlu húsunum. Fornminnafelagið heldur sjálvt til aðrastaðni í húsunum.

Treytirnar hjá Leikalund fyri at verða í handlinum er, at einki verður broytt uttan í samráði við nevndina í Norðoya Fornminnafelag. Sumt av innbúgvinum er líka gamalt sum handilin, meðan annað er eitt sindur nýggjari.

Áðrenn handilin lat upp, brúktu Bjarni og Edvard einar tríggjar mánaðir til at gera hølini klár. Tað, sum varð broytt, varð gjørt í upprunastand, og alt, sum skuldi brúkast til fløgur og bøkur, varð hondgjørt til handilin.

- Hugskotið hjá okkum var at gera ein handilin, sum kann lokka fólk inn, uttan at tað hongur eitt tilboðsskelti í vindeyganum, sigur Bjarni Ziska Dahl.

### Hvørki sterilt ella hátøkni

Hóast ungfólk eru ein týðandi partur av viðskiftafólkunum hjá Leiklund, dámar teimum væl gamla stílin í handlinum.

- Nógvastaðni verður roynt at gera handlar til ung sterilar og hátøkniligar, men hetta er nakað heilt annað. Her er gamalt innbúgv, slitnir diskar og skeivar hillar, men tað dámar teimum væl, sigur Bjarni Ziska Dahl.

Konseptið er sjáldsamt og øðrvísi, men tað er ikki altíð so praktiskt.

- Tað finst neyvan ein bein hill inni í handlinum, men tað mugu vit taka við, tí hetta er ein gamal handil, sum skal líkjast sær sjálvum, sigur Bjarni Ziska Dahl.




**Fríggjadagin 11. august**

| | |
|---|---|
| kl. 17 | Kabarettin »Land í eygsjón« verður sýnd fyri børnum |
| kl. 18–22 | Tivoli á Nýggjaveg |
| kl. 19–22 | Stevnukioskin opin |
| kl. 20 | Kabarettin »Land í eygsjón« verður frumsýnd |
| kl. 20–22.30 | Barnadansur í teltinum |
| kl. 23 | Dansur í teltinum, Feedback spælir |

**Leygardagin 12. august**

| | |
|---|---|
| kl. 14 | Una Hansen setur stevnuna í Geilini. Nólsoyar Sangkór luttekur |
| kl. 14.30–01 | Stevnukioskin opin |
| kl. 14.30 | Kappróður um Nólsoyarfjørð byrjar undir Argjalandinum |
| kl. 15 | Stuðulssvimjingin um Nólsoyarfjørð byrjar Yviri við Strond |
| kl. 15–23 | Breyðsøla í Avhaldshúsinum |
| kl. 15–24 | Tivoli á Nýggjaveg |
| kl. 15 uml. | Bátarnir koma á mál á Nólsoyarvík |
| kl. 16 | Nólsoyar sterkasti maður á økinum við Nólsoyar Alistøð |
| kl. 16–20 | Kapping og spøl fyri børn í skúlanum |
| kl. 16–20 | Loppumarknaður og kaffisøla í skúlanum |
| kl. 16.30–18 | Svimjararnir koma í land í Nólsoy |
| kl. 17 | Kabarettin »Land í eygsjón« í Royndarhúsinum |
| kl. 19 | Kabarettin »Land í eygsjón« í Royndarhúsinum |
| kl. 20–22.30 | Barnadansur í teltinum |
| kl. 22 | Felagssangur undir Mikkjalsveggi |
| kl. 23 | Dansur í teltinum, All that Rain spælir |

**Sunnudagin 13. august**

| | |
|---|---|
| kl. 12 | Gudstænasta við Sverra Steinhólm, presti |
| kl. 14–18 | Kapping og spøl fyri børn í skúlanum |
| kl. 14–18 | Loppumarknaður og kaffisøla í skúlanum |
| kl. 16–20 | Tivoli á Nýggjaveg |
| kl. 16–20 | Stevnukioskin opin |
| kl. 18 | Kabarettin »Land í eygsjón« í Royndarhúsinum |

**Mánadagin 14. august**

| | |
|---|---|
| kl. 20 | Kabarettin »Land í eygsjón« í Royndarhúsinum |

* Alla dagarnar er møguleiki at síggja bátin hjá Ova, »Dianu Victoriu«.

**Í sambandi við stevnuna siglir M/F Ritan soleiðis:**

| Fríggjadag | Leygardag | Sunnudag |
|---|---|---|
| 07.00 | 09.15 | |
| 12.00 | 13.00 | 10.00 |
| 15.00 | 15.00 | 15.00 |
| 18.00 | 18.00 | 18.00 |
| 20.00 | 21.00 | 19.30 |
| 23.00 | 23.00 | 20.30 |
| | 03.00 | |

Siglt verður nevndu tíðir av Bursatanga og úr Nólsoy uml. 20 min. seinni.

**Stuðulsnevndin fyri svimjihyli í Nólsoy**